# Føroyar enn í frægara enda

**Hóast føroyska gjaldaindeksið er hækkað, eru Føroyar framvegis í frægara endanum, men kortini vánaligasta landið í Norðurlondum, vísir Gjaldsindeks 2009 hjá Intrum Føroyar**

GJALDSINDEKS

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Hetta er triðja árið, at Intrum Føroyar ger eitt føroyskt gjaldsindeks. Tey bæði fyrstu árini lá indeksið á 140, men í ár er talið hækkað upp í 146. At talið hækkar er ikki gott tekin, tí tað ræður um at koma so langt niður móti 100, sum tilber.

So langt niður ber kortini ikki til at koma – uttanso, at øll søla fer fram kontant – men Finland er besta landið í so máta og teirra gjaldsindeks liggur um 125.

Intrum Justitia er fleirtjóða felagsskapur, og hevur skrivstovur runt um í Europa, og kanningin umfatar 26 lond. Finland er sum nevnt tað landið, har fólk eru raskast at gjalda sínar rokningar, meðan Portugal er nógv vánaligast í so máta við einum gjaldsindeksi á 184. Tey fýra norðanlondini eru saman við Íslandi nummar eitt á listanum við Svøríki í hølunum á Finlandi. Síðani kemur Noregi, Danmark og so Ísland. Eftir teimum koma Sveits og Írland, og nummar átta á listanum eru so Føroyar.

Tað kann kanska undra, at Ísland liggur so ovarliga á listanum, men havast skal í huga, at spurnarkanningin fer fram frá 10. januar til 31. mars, og tí hevur Ísland ikki merkt fullu avleiðingarnar av kreppuni, tá kanningin varð gjørd.

Týskil kann roknast við, at Ísland rýkur niður eftir listanum til kanningina komandi ár.



*Einar 25-30 fyritøkur vóru umboðarar á kunnandi fundinum hjá Intrum Føroyar fríggjadagin*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

## 105 fyritøkur

Føroyski parturin av kanningini fer eisini fram í sama tíðarskeiði, og við í kanningini eru 105 føroyskar fyritøkur.

Kanningin vísir, at føroyskar fyritøkur hava munandi størri tap av skuldanum í ár enn undanfarin ár. Heili 2,5% av umsetninginum hava fyritøkur tapt í ár í mun til 1,1% í 2008 og 1,5% í 2007.

Sum høvuðsorsøk til seinar gjaldingar siga fyritøkurnar, at skuldarin er í fíggjarligum trupulleikum ella at seinkað gjalding er tilvitað.

Ein annar áhugaverdur spurningur, sum settur verður, er hvussu kreppan hevur ávirkað fyritøkurnar. Har er mest nevnda svarið minka av sølu, versnað gjaldføri, fleiri seinar gjaldingar frá kundum og skerdar kredittreytir frá veitarum.

Tendensurin er eitt hækkandi gjaldsindeks, so áhugavert verður at síggja, um tað eisini hækkar til komandi ár.




**NISSAN PATHFINDER 2.5 TD VØR.** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** UE 385 **Km:** 34.000
**Árgangur:** mars 2007
**Útgjald:** 53.500 **Mðr. gjald:** 3.327 (5 ár)
**kr. 214.000,-**



**TOYOTA COROLLA 1.6 TERRA H/B** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** HU 377 **Km:** 29.000
**Árgangur:** mai 2005
**Útgjald:** 34.500 **Mðr. gjald:** 2.167 (5 ár)
**kr. 138.000,-**



**CITROEN BERLINGO 1.6** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** MH 545 **Km:** 74.000
**Árgangur:** apríl 2005
**Útgjald:** 28.000 **Mðr. gjald:** 2.755 (5 ár)
**kr. 112.000,-**



**FORD MUSTANG 4.6 V8** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** RD 801 **Km:** 7.500
**Árgangur:** mai 2008
**Útgjald:** 103.750 **Mðr. gjald:** 6.361 (5 ár)
**kr. 415.000,-**



**TOYOTA AVENSIS 2.0 SOL SEDAN** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** KJ 840 **Km:** 81.000
**Árgangur:** feb. 2004
**Útgjald:** 37.000 **Mðr. gjald:** 3.587 (3 ár)
**kr. 148.000,-**



**BMW 316 TI** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** DN 339 **Km:** 44.000
**Árgangur:** sept. 2001
**Útgjald:** 24.500 **Mðr. gjald:** 2.425 (3 ár)
**kr. 98.000,-**



**TOYOTA YARIS 1.3 LUNA M/M** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** GB 420 **Km:** 36.000
**Árgangur:** august 2006
**Útgjald:** 34.000 **Mðr. gjald:** 2.125 (5 ár)
**kr. 136.000,-**



**YARIS 1.4 D4D LUNA DIESEL** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** KT 175 **Km:** 101.000
**Árgangur:** mars 2006
**Útgjald:** 33.000 **Mðr. gjald:** 2.066 (5 ár)
**kr. 132.000,-**



**NISSAN KING CAB 2.5 DIESEL** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** LU 544 **Km:** 40.000
**Árgangur:** nov. 2006
**Útgjald:** 54.000 **Mðr. gjald:** 3.333 (5 ár)
**kr. 215.000,-**



**TOYOTA COROLLA 1.6 TERRA H/B** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** DJ 092 **Km:** 56.000
**Árgangur:** oktober 2002
**Útgjald:** 22.000 **Mðr. gjald:** 2.179 (3 ár)
**kr. 88.000,-**

6 mánaða garanti

**Vit bjóða nú 6 mánaða garanti uppá bilar, ið kosta meira enn 85.000,-**
Garanti skipan, ið hevur eina sjálvsábyrgd uppá kr. 500,-, fevnir um allar knappliga íkomnar feilir, ið eyðsæð ikki skyldast nýtslu brúkarans, rust, uttanífrákomnir skaðar ella væntandi tænastueftirlit.
Eingin gandur og eingir smáir bókstavir.
**Kom og vitja okkum – landsins fremstu bilasølu.**

Brúktir bilar við
**lagaligari fígging**

**REYNI SERVICE** P/F
Vegurin Langi · Hoyvík · Tel 353040 · Fax 353041
Við Borðoyavík · Klaksvík · Tel 473040 · Fax 473041
T-postur: rs@reyniservice.fo · www.reyniservice.fo